StÍF-Neistin 25-19 (10-14):

Ein vika til stóra slagið

Strandingar tóktust í longum løtum bert at hugsa um komandi stórdystin í Vestmanna, men teir megnaðu kortini at toga ein tryggan sigur heim, tá Neistin vitjaði

MANSHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað er einki at ivast í, hvar eyguni hjá strandingum eru vend í hesum døgum. Stóra FM-finalan móti VÍF hevur seinastu vikurnar staðið sum ein stórur skuggi yvir restina av dystunum, og kanska hava avrikini á vøllinum eisini verið merkt av hesum.

Nóg mikið

Í øllum førum tóktust strandingar at vera í heilt øðrum hugaheimi stóran part av dystinum, tá teir sunnudagin tóku ímóti Neistanum.

Neistin, sum annars ikki hevur verið serliga høgt flúgvandi seinastu umførini, og sum hesa ferð eisini mátti vera ein skaddan Áka Mørk fyriuttan, var væl og virðiliga betra liðið í fyrra hálvleiki. Ikki minst tóktist Helgi Justinussen at trívast væl á heldur óvanda miðplássinum, og spakuliga vunnu teir seg alt longi frá vertunum. Pappírið sigur, at munurin í steðginum var fýra mál, men hesin kundi væl verið munandi størri, høvdu gestirnir verið eitt lítið sindur kaldari í nøkrum avgerandi løtum.

Í seinna hálvleiki vóru partarnir ikki at kenna aftur. Ivaleyst høvdu vertirnir fingið nøkur álvarslig orð frá venjaranum í steðginum, og teir vóru í øllum førum fullkomuliga hamskiftir, nú farið varð undir dystin aftur.

Serliga fingu teir verjupartin at rigga, soleiðis at neistamenn ikki vistu sær onnur ráð enn at skjóta útifrá, og móti Marian Cirloganescu er hetta í øllum førum ikki nakað, sum gevur serliga góð úrslit.

Neistin fekk bert tvey mál fyrstu 5/6 av seinna hálvleiki, og so var dysturin sum so avgjørdur. Seinastu løtuna gekk meira javnt á, men tá var sigurin eisini vísur, so strandingarnir tóku sær tá meira av løttum.

Eftir ein fyrra hálvleik, har Neistin stóð fyri tí mesta, fekk StÍF í seinna hálvleiki staðfest, at teir avgjørt eiga eitt av sterkastu liðunum í landinum

Mynd: Álvur Haraldsen

Týðandi staðfestingar

Og við sigrinum í fingu strandinganir helst staðfest tveir lutir. Hitt var, at teir nú í øllum førum eru vísir í at fáa silvurið, tá teir fara til Vestmanna, har ein javnleikur er nóg mikið til gullið, tó at tað neyvan verður spælt upp á javnleikin.

Hitt seinna var kanska meira týdningarmikið. Nevnliga at teir framvegis megna at toga verjuna upp, tá tørvur er á tí. Hetta er nakað, sum hevur verið borganin fyri góða spælinum hjá StÍF, tá tað er upp á tað besta, men tað er tó nakað síðani, at tað hevur verið tað.

Móti skjúttunum hjá VÍF er tó júst hesin parturin alneyðugur at hava í rættlag, og í so máta var hetta helst týdningarmikla staðfestingin hjá StÍF. Nevnliga at teirra sterkasta vápn er um at verða løtt, soleiðis at gullið kann spælast heim. Men hinvegin – so vilja vestmenningar helst eisini tosa við í hesum spurninginum.

Dysturin í tølum

StÍF-Neistin 25-19 (10-14)

Málskjúttar:
StÍF: Sveinur Justinussen 7, Alexandur Johansen 6(2), Bent Djurhuus 4, Costin Dumitrescu 2, Kristjan Petursson 1, Artur Johansen 1, Borgar Danielsen 1
Neistin: Dann Thorleifsson 5(1), Ragnar Stakksund 2, Birgir Kass 2, Ræni Slættanes 2, Jón Ludvig 2, Kári Mortensen 2, Helgi K. Justinussen 2(1), Morgan Knezevic 2
Brotskøst: StÍF 2, Neistin 4
Útvísingar: StÍF 1, Neistin 3
Dómarar úr Tjaldur: Trygvi Mortensen & Hartvig Joensen. Høvdu til tíðir trupult at finna runt í rótutu uppgerðunum á vøllinum.

Hondbóltsstøður

1. Deild kvinnur

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1	VB	11	10 - 1 - 0	600	482	118	30
2	VÍF	11	7 - 2 - 2	538	448	90	24
3	StÍF	11	6 - 1 - 4	552	552	0	19
4	Stjørnan	12	4 - 1 - 7	529	530	-1	17
5	Kyndil	11	4 - 1 - 6	554	563	-9	15
6	Neistin	11	4 - 0 - 7	474	517	-43	13
7	Tjaldur	11	1 - 0 -10	430	585	-155	3

1. Deild menn

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1	StÍF	11	8 - 2 - 1	671	578	93	27
2	VÍF	11	8 - 0 - 3	722	608	114	25
3	Kyndil	11	8 - 2 - 1	660	600	60	24
4	Neistin	11	4 - 1 - 6	638	618	20	18
5	KÍF	12	3 - 2 - 7	642	681	-39	13
6	H71	11	4 - 0 - 7	587	677	-90	11
7	Tjaldur	11	0 - 1 -10	583	741	-158	4

Máltindarnir

Kvinnur

Daiva Tuomaite	VB	184	(48)
Danijela Ercevic	Stjørnan	174	(47)
Asta Petrauskiene	StÍF	171	(42)
Simona Dziugyte	Neistin	164	(55)
Sóley Mikkelsen	VÍF	154	(46)
Reda Kurkauskiene	VB	148	(19)
Natasja Stamenkovic	Stjørnan	136	(13)
Lotte Sørensen	Kyndil	130	(64)
Milica Ergic	Tjaldur	129	(24)
Lenka Ribaric	Tjaldur	119	(32)
Alina Olaru	StÍF	117	(8)
Jacklin Durhuus	VÍF	100	(9)
Nicoleta Radu	VÍF	94	(4)
Ileana Manolescu	Kyndil	93	(13)
Poula D. Olsen	StÍF	74	(4)

Menn

Dragisa Stojovic	Tjaldur	224	(20)
Damir Oros	KÍF	197	(43)
Sveinur Justinussen	StÍF	161	(23)
Halgir D. Olesen	H71	152	(6)
Áki Olsen	VÍF	149	(11)
Morgan Knezevic	Neistin	134	(28)
Ingi Olsen	VÍF	130	(28)
Jacob Jónsson	Kyndil	128	(7)
Finnur Hansson	Kyndil	121	(15)
Áki Mørk	Neistin	116	(26)
Costin Dumitrescu	StÍF	111	(22)
Hans Áki Dal-Christiansen	Kyndil	104	(27)
John Zachariasen	VÍF	98	
Petur Martin Poulsen	KÍF	97	
Niels Viggo Niclassen	H71	94	(1)

Næstan met

Tað er sjáldan, at ein partur av einum hondbóltsdysti skjýtur somiki ðnógv mál, sum Kyndil gjørdi sunnudagin. Bert eina ferð seinastu fýra árini er hetta hent, tá Neistin seinsta kappingarár vann 47-31 á KÍF, og annars er tað ikki meira enn 10 ferðir áður hent hesi fýra árini, at annar parturin hevur fingið fleiri enn 40 mál.

Til stuttleikar kann eisini nevnast, at Tjaldursmenn, sum altso vóru mótstøðuliðið hjá Kyndli sunnudagin, hvørja ferð burtur sað frá sjálvum metinum eiga lut í úrslitunum, og bert ta eina ferðina hevur hetta verið sum vinnarar av dystinum.

jm

Fleiri enn 40 annan vegin:

1999/2000
Tjaldur-Neistin 30-41
Neistin-Tjaldur 42-24

2000/2001
Tjaldur-StÍF 23-42
Tjaldur-VÍF 17-43

2001/2002
Tjaldur-Neistin 24-41
Neistin-KÍF 47-31
H71-Tjaldur 36-43

2002/2003
VÍF-Tjaldur 41-16
KIF-Tjaldur 42-23
Tjaldur-StÍF 31-42
Kyndil-Tjaldur 46-29

Fleiri venjarar í kløunum tráði

Um gongdin higartil í vár fer at halda fram, so er ikki eingin møguleiki fyri, at onnur lið enn FCK og Brøndby fara at blanda seg í stríðið um DM

SUPERLIGAN
Jóannes Hansen

Tólv umfør eru eftir, áðrenn danska kappingarárið verður lokið, og tað harvið verður greitt, hvør skal vinna meistaraskapin, hvørji sleppa upp í part í Europa Cup, og hvørji feløg skulu tungu gongdina niður í næstbestu deildina.

Hjá FCK hevur gingið illa. Munurin aftur til Brøndby á næstfremsta plássinum er miknaður úr tíggju og til fýra stig. Men eingin vandi tykist vera fyri, at Hans Backe skal fella sum venjari.

Hjá fýra øðrum feløgum hevur tað eisini gingið av skriðuni í teimum trimum umførunum, sum eru avgreidd higartil í vár, og nú verður í Danmark tippað um, hvør fyrsti venjarin verður, sum fer at fáa sekkin. Feløgini, sum hava havt soltnastu úrtøkuna, eru AaB, Viborg, AGF, sum øll eru úr Jyllandi, og so høvuðsstaðarfelagið AB.

Roknað verður ikki við, at væl umtókti Poul Hansen í AGF fer at fáa sekkin, og tað fer Ove Christiansen í AB kanska heldur ikki nú beinanvegin. Harafturímóti verður roknað við, at Søren Kusk í Viborg og Poul Erik Andresen í AaB sita rættuliga leysir í stólinum. Kanska annar teirra longu í hesi vikuni fer at vera fyrrverandi venjari.

Nærkast toppinum

Í tveimum feløgum hevur tað gingið sera væl, síðani bólturin fór á rull aftur í superliguni. Talan er um Farum og FC Midtjylland. Hesi bæði feløgini hava fingið góða úrtøku, og nú verður tosað um, at tað er ikki heilt eingin møguleiki fyri, at tey fara at blanda seg í stríðið um gullkrónurnar. Serliga um FCK framvegis fer at hava so soltna úrtøku, sum teir hava havt higartil í ár.

Leygardagin hevði FCM vitjan av AaB. Stríðið um fótbóltstrúnuna í Jyllandi, søgdu miðlarnir, og tað var FCM, sum endaði omaná. AaB legði seg á odda, men heimaliðið á Ikast stadion skoraði tvær ferðir, og vónbrotið í Aalborg var stórt.

Farum hevði sunnudagin vitjan av AB. Tað tykist sum um teir í Farum hava fingið tak á figgjarliga partinum – í hvussu so er í fótbóltsfelagnum – og á vøllinum gongur tað strúkandi. Hesa ferð høvdu teir vitjan av AB. Talan var fyri stuttum um, at hesi bæði feløgini skuldu leggja saman, men einki spurdist burturúr. Farum venjarin, Christian Andersen, hevur áður vant AB.

Gestirnir høvdu bóltin nógv, og teir dugdu væl at samanspæla, men teir fingu einki mál. Í vikuni upp undir dystin hevði AB venjarin gjørt av, at ungi Stephen Andersen skuldi verja málið í staðin fyri veteranin Jan Hoffman. Tað var ikki serliga heppin avgerð, tí málverjin var uppií báðum málunum, sum Farum skoraði.

Viborg á botni

OB hevði undan vitjanini í Silkeborg vunnið tvær ferðir. Hesa ferð megnaðu teir bara 1–1 ímóti Silkeborg, sum í heyst hevði syndarliga lítla úrtøku, men sum nú tykist hava møguleika at vinna í stríðnum um at sleppa undan niðurflyting.

Aftastu bríkina hitar Viborg hesa vikuna. Sunnudagin vóru teir í Køge og spældu sannan botngysara. Bara 896 áskoðarar møttu upp, og teir sóu heimaliðið vinna 2–0 og harvið lyfta sær fimm stig upp um niðurflytingina.

Hjá AGF var aftur talan um stórt vónbrot. Í jyska klassikaranum ímóti Esbjerg taptu teir 4–1. Harvið lyfti Esbjerg sær orduliga burtur frá botnplássunum. AGF hevur brúkt nógvar pengar upp á nýggjar spælarar og væl umtóktan venjara. Men higartil hevur gingið illa at spæla eitt gott lið saman, og AGF hongur fast í botnsirupinum. Har stríðast seks feløg nú um at sleppa undan teimum báðum plássunum undir strikuni, tá ið 33. og síðsta umfarið er liðugt spælt. Tey eru Viborg, AB, AGF, Silkeborg, Køge og AaB.

Danska superligan

		d	v	j	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	FCK	21	11	7	3	33	21	12	40
2	Brøndby (M)	21	10	6	5	41	22	19	36
3	FCM	21	9	6	6	32	25	7	33
4	Farum	20	11	0	9	31	36	-5	33
5	Esbjerg	21	8	7	6	42	39	3	31
6	OB (S)	21	8	6	7	34	28	6	30
7	AaB	21	8	3	-10	27	31	-4	27
8	Køge	21	8	2	-11	34	44	-10	26
9	AB	21	5	8	- 8	25	27	-2	23
10	AGF	20	6	5	- 9	29	39	-10	23
11	Silkeborg	21	5	6	-10	27	34	-7	21
12	Viborg	21	5	6	-10	33	42	-9	21

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)

Danska 1. deild

		d	v	j	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Herfølge	18	13	2	3	42	23	19	41
2	Frem	18	11	3	4	43	26	17	36
3	Skjold	18	9	4	5	35	19	16	31
4	Fredericia	18	8	6	4	26	15	11	30
5	Randers F.	18	9	3	6	37	28	9	30
6	HFK Sønderj.	18	8	5	5	40	33	7	29
7	Vejle	18	8	4	6	28	27	1	28
8	Ølstykke	18	7	6	5	42	37	5	27
9	B 93	18	5	5	8	26	30	-4	20
10	B 1913	17	5	5	7	23	30	-7	20
11	Brønshøj	17	5	4	8	21	26	-5	19
12	FC Aarhus	18	5	3	-10	26	33	-7	18
13	AC Horsens	18	4	6	8	25	32	-7	18
14	Hvidovre	18	4	4	-10	20	37	-17	16
15	HIK	18	4	4	-10	22	45	-23	16
16	B 1909	18	3	6	9	30	45	-15	15

Óli undir strikuni

Ulrik Balling var aftur á Vejle liðnum, meðan Christian Høgni Jacobsen ikki var við í Ølstykke

DANMARK 1. DEILD
Jóannes Hansen

Fyri trimum vikum síðani varð Vejle venjarin Frank Petersen uppsagdur. Sunnudagin var Henrik Brandenborg fyrstu ferð á Vejle beinkinum. Vejle var á Sælandi og spældi ímóti Ølstykke, og tað royndist sera væl. Vejle vann 3–0. Málini fingu teir í 16., 50. og 63. minutti.

Christian Høgni Jacobsen var ikki á liðnum og heldur ikki á beinkinum. Áðrenn hann síðsta summar kom til NSÍ, var Ulrik Balling í Vejle. Síðani tað gjørdist greitt, at hann ikki fór at koma aftur til NSÍ hevur ljóðað, at Balling aftur skuldi spæla við Vejle, men ikki fyrrenn sunnudagin var hann fyrstu ferð á liðnum. Hann hevur verið skaddur í vetur.

Sagt verður at Ulrik Balling var sera væl upplagdur. Hann skoraði ikki, men hann var við í uppspælinum til okkurt av málunum, og hann sendi eina ferð í rammuna rundanum málið.

Óli Johannesen og Hvidovre høvdu vitjan av HFK Sønderjylland. Gestirnir vunnu 2–1, og tað sær einki út hjá Hvidovre, sum nú er niðanfyri niðurflytingarstrikuna.

Alt bendir framvegis á, at tað verða Herfølge og Frem, sum fara at flyta upp í superliguna, sum harvið fer at verða uppaftur meiri høvuðsstaðarkend, enn hon frammanundan er tað.

Hesa ferð vann Herfølge 2–0 á heimavølli ímóti FC Aarhus, og Frem vann á pappírinum torføran útdyst ímóti Randers Freja. Eisini í tí uppgerðini var úrslitið 2–0.

Seinastu tíðina hevur verið nógv tosað um, at Køge og Herfølge skulu leggja saman til eitt felag. Kommunan í Køge er sinnað at byggja nýtt stadion, men samtyktin er treytað av, at tey bæði stóru feløgini í kommununi leggja saman til eitt felag. Higartil í ár hevur nógv bent á, at Køge fór at vera stóra felagið í samanleggingini. Nú er møguleiki fyri, at um talan verður um samanlegging í summar, so verður talan um tvey feløg í superliguni ella um Herfølge sum felag í bestu deildini og Køge sum felag í næstbestu deildini, eftir at teirra lið í superliguni møguliga verður flutt niður í 1. deild.

Fusari uttan føroyingar á vøllinum

Toppdysturin í superliguni gjørdist ongantið tað, sum roknað varð við, og hvørki Todi Jónsson ella Jón Rói Jacobsen vóru á vøllinum

ÚTISETAFELØG
Jóannes Hansen

40.254 áskoðarar er ein stór fjøld. Tað sást og hoyrdist í Parkini sunnudagin, at har vóru nógvir áskoðarar. Eftir dystarenda var talan um ørkymlan. Úrslitið var 1–1, hvørgin parturin hevði vunnið, og spælið hevði ikki verið nakað at reypa av. Fleiri enn tredivu fanatiskir áskoðarar endaðu í brummuni.

Tosað varð frammanundan um stóra brakið, sum tað á nútíðar máli verður nevnt, tá ið talan er um stórdyst. Bara eitt brak var í Parkini. Beinanvegin tveitti ein áskoðari eina stóra bumbu inn á vøllin. Hon brast tætt við unga Brøndby málverjan, Ankergreen, og eina løtu vóru teir bangnir fyri, at hoyrnin hjá honum skuldi hava tikið skaða. Men, tíbetur, so var alt í lagi.

Á vøllinum var lítið at reypa av. Poleraðum fótbóltsspæli sást millum lítið og einki til. Í staðin fyri skjótt og hugflogsríkt samanspæl, so var heldur talan um nógvar langar og skeivar sendingar, og harvið gekk lítið fyri seg á miðvøllinum.

Brøndby var leikliga omaná stórar partar av tíðini. Teir løgdu seg á odda, tá ið Morten Wieghorst eitt korter undan leikloki stútaði bóltin í málið. Tá tóktist tað sum um fjarstøðan fram til FCK á fremsta plássinum í superliguni eftir trý tey fyrstu umførini eftir vetrarsteðgin fór at vera minka frá tíggju og til bara eitt stig, men soleiðis var ikki. Lítla løtu eftir leiðslumálið hjá Brøndby fekk FCK brotsspark, sum liðformaðurin Peter Nielsen setti í netið.

Brotssparkið varð dømt ímóti svenska álopsspælaranum Jörgen Pettersson. Hann hevur havt sera ilt við at sannføra um, at hann hevur uppiborið stóru lønina, sum hann fær í FCK. Sunnudagin tóktist hann kortini betri upplagdur, enn hann hevur verið higartil. Men hann skoraði ikki, og hann hevur framvegis bara skorað tvey mál, síðani hann síðsta summar flutti til FCK.

Eftir dystin helt Brøndby venjarin, Michael Laudrup, at liðið hjá honum hevði vístbetri spæl enn heimaliðið. Hann iðraði seg um, at FCK so skjótt hevði javnað til 1–1, men hann segði seg væl kunna liva við javnleikinum, og Laudrup helt, at tað framvegis er møguleiki fyri, at liðið hjá honum skal røkka FCK, sum er fýra stig á odda.

Michael Laudrup gav sunnudagin fleiri av blaðungu Brøndby spælarunum møguleikan at vísa, hvør dugur er í teimum. Danska pressan er samd í, at teir stóðu seg væl. Jón Róa Jacobsen slapp kortini ikki á vøllin. Dan Anton Johansen var í miðverjuni undir liðini á liðformanninum Per Nielsen, og Jón Rói Jacobsen sat allar 90 minuttirnar á beinkinum.

Todi bara umrøddur

FCK venjarin, Hans Backe, segði seg vera væl nøgdan við úrslitið, og hann segði seg síggja ljóst upp á komandi vikurnar, sjálvt um liðið hjá honum bara hevur fingið tvey stig í trimum dystum.

Í annaðkvøld skulu FCK og Brøndby spæla fjórðingsfinalu í steypakappingini í Parkini. FCK venjarin harmaðist um, at bæði Peter Christiansen og Erik Mykland sunnudagin vóðu so mikið skaddir, at tað er sera ivasamt, um teir verða tøkir í annaðkvøld. Frammanundan er Thomas Røll skaddur, og tað heldur FCK venjarin vera dyggan smeit.

FCK venjarin tók ikki Toda Jónsson upp á tunguna við einum orði. Todi var ikki í FCK hópinum sunnudagin, og FCK leiðslan skal ivaleyst kenna seg rættuliga kroysta av skaðum og leikbannum, áðrenn Hans Backe fær loyvi at senda boð eftir føroyska spælaranum.

Í umrøðuni undan dystinum helt fyrrverandi landsliðsmiðvallarin Per Frimann annars, at tað hevði verið fongur í at havt Toda á liðnum ella í hvussu so er á beinkinum. Men teir í FCK leggja eftir øllum at døma ikki dent á somu lutirnar, sum serfrøðingarnir gera. So verður tað harvið, at tað kanska kostar DM heitið.